


# Javna-fiesta í Spania

## frá 22. apríl til 1. mai 2025





Sólorka er eitt føroyskt umhvørvi úti í heimi við góðum veðurlagi, tryggleika, persónligari nærveru, vælvirkandi tænastum og fyrstafloks innihaldi. Hjá okkum skulu vit øll kenna okkum væl – gomul sum ung, bólkar sum einstaklingar – uttan mun til, hvørji vit eru, og um vit eru frísk og fullfør ella stríðast við sjúku, brek ella aðra avbjóðing.

Byggjandi á drúgvu royndir okkara við serligum tænastum skipa vit – í samstarvi við **JAVNA** - fyri eini nýggjari servitjan í Spania fyri gestir við serligum tørvi og teirra familjur og avvarðandi, teirra millum systkjum.

Vitjanin skal byggja á tryggleika og nærveru okkara og á samstarv okkara við læknar og sjúkrahúsverk og aðrar samstarvspartar umframt drúgvu royndirnar hjá okkara starvsfólkatoymi, har tey flestu tosa føroyskt.

Umframt hugnan og stuttleikan á gistingarøki okkara ætla vit at at skipa fyri løttum gongutúrum og útferðum í vøkrum umhvørvi, har okkurt gott finst til allar sansirnar.







Harafturat verða hópin av stuttligum aktivitetum, uppgávum, kappingum og spølum. Somuleiðis verður vitjanin eyðkend av tónleiki, sangi og dansi.

Ætlanin er eisini at skipa eitt hvíldarøki, sum gestir okkara kunnu brúka eftir vild ein rættiliga stóran part av tíðini.

Hendan servitjanin verður í Albir á sponsku Costa Blanca í døgunum frá 22. apríl til 1. mai 2025. Talan er sostatt um 9 nætur.

Sum vant flúgva vit beinleiðis millum Vágar og Alicante við okkara egnu leiguflogførum við føroyskari flogmanning, sólorku-starvsfólki og mati umborð.

Niðanfyri eru nøkur prísdømi, men øll eru vælkomin at venda sær til **JAVNA** við spurningum. Tað ber eisini stovnum, felagsskapum, familjum og einstaklingum til at tekna seg til vitjanina hjá **JAVNA**

- umvegis teldupostadressuna **skriv@javni.fo**
- ella við at ringja á **tlf. 208090**





| PRÍSDØMI (í krónum) | |
|---|---|
| Fyri hvønn (um tvey gista saman) | 10.800,- |
| Eyka fyri einakamar | 1.350,- |
| 2 vaksin (um tey gista saman) | 21.600,- |
| 2 vaksin + 1 barn (2 – 11 ár) | 28.675,- |
| 2 vaksin + 2 børn (2 – 11 ár) | 33.415,- |
| 2 vaksin + 1 vaksin (uppreiðing) | 31.500,- |
| Børn undir 2 ár | Ókeypis |

**ÍROKNAÐ**

- Beinleiðis flogferð Vágar-Alicante t/r við mati umborð
- Bussur millum flogvøllin og hotellið t/r
- Gisting við fullari pensjón uttan drykkjuvørur
- Hjálp og vegleiðing á føroyskum allan sólarringin
- Undirhald, tónleikur og dansur o.a.

- Eyka fyri superiorkamar: kr. 1.225,-
- Eyka fyri 'all inclusive': kr. 810,- fyri hvønn
- Eyka fyri útferðir við føroyskum túrleiðara